# Nýggj psykoterapeutisk útbúgving í Føroyum

TÍÐINDASKRIV




Dansk Institutt for Kropsorienteret Psykoterapi er ein privatur útbúgvingarstovnur, sum er stovnaður í 1988. Stovnsleiðari er Rigmor Hansen. Stovnurin er ein av teimum fyrstu psykoterapeutisk útbúgvingarstovnum í Danmark. Fakligu aktivitetirnir hjá stovnnum eru í støðugari menning á høgum altjóða støði.

## Metoda og teori

Útbúgvingin er grundað á eina teoretiska og praktiska innleiðin í kropsorienteraðari psykoterapi, sum er ment av altjóða góðkendum kropsteraeutum: Wilhelm Reich, Albert Pesso, Alexander Lown og Peter Levine.

Stovnurin hevur spesialiserað seg í dýpdarpsykologiskari heildarterapi. Vit arbeiða við at integrera alla persónsmenskuna í terapeutiska prosess fyri at náa inn til upprunaligu kjarnuna av kroppi, kenslum, ego, sál, spiritualiteti og hjarta. Hervið styrkist og víðkast øll persónsmenskan, og skpatir verða nýggir og varandi lívs-j og virkismøguleikar.

Afturat hesum hevur stovnurin spesialiserað seg ði viðgerð av menniskum, sum hava verið fyri umsorganarsviki ella øðrum álvarsomum svikum (psykiskt, fysiskt ella seksuelt) og av menniskum, sum hava verið út fyri sjokki og traumaum.

## Endamálið við útbúgvingini

At tú styrkir tínar persónligu og fakligar førleikar.

Endamálið við útbúgvingini er m. a. at førleikamenna professiónellar viðgerar í teirra arbeiði við mennisku,, sum hava verið fyri umsorganarsviki og traumaum.

Útbúgvingin gevur breitt innlit í kropsorienteraða psykoterapi og í øll tey amboð, sum eru neyðug til tess at verða ein fakliga dugnaligur og professiónellur psykoterapeutur, supervisor og coach.

## Innihald

Í útbúgvingini arbeiða vit m. a. við hesum: eginterapi, teori, terapeutvenjing, supervisiterað praksis og reflekterandi teamum, bioenergetiskum kropsvenjingum, trampedansi, reichianskum- og bioenerketiskum karaktersstrukturum, konfliktloysnum, stressviðgerð, leiðarastíli, coaching og spurevisión.

Arbeiðsformurin er prosesvendur, upplivingarð og luttakaravendur. Skift verður millum teoriupplegg, demonstratión og dialog, bólka-, par-, og einstakligavenjingar, einstaklinga terapi í bólkinum og supervisiterað praksis.

## Luttakarar:

Útbúgvingin vendir sær til

- Fakbólkar, sum arbeiða professiónelt við menniskum
- mennisku, sum ynska djúptøkna menningartilgongd, sum skal hjálpa í arbeiðslívinum
- leiðarar, sum ynskja at førleikamenna leiðaraeginleikar
- fólk, sum arbeiða innan heilsu-, undirvísingar-, pedagogiska-, psykologiska og psykatriska økið, og sum hava tørv á eftirútbúgving og ajourføring.
- alternativar viðgerar og psykoterapeutar við øðrum referansum innan psykoterapi, sum vilja supplerandi eftirútbúgving, ajourføring.

## Krøv til luttakarar

Tilgongdin við útbúgvingini skal forankra tínar fakligar førleikar í eini meira integreraðari persónligheit.

Útbúgvingin kvalifiserar teg sum psykoterapeut, coach og supervisor við individuel-, par- og familjuterapi sum virkisøki og kann brúkast bæði í setan og sum privatpraktiserandi. Haraftrat kvalifiserar útbúgvingin teg til at venja og supervisera bólkar, m. a. fakbólkar sum sjúkrarøktarfrøðingar, pedagogar, fysioterapeutar, sosialráðgevar, viðgerar, psykoterapeutar o. s. fr.. Tú kanst eisini brúka útbúgvingina á privata arbeiðsmarknaðinum og innan fyri organisatiónir, sum psykoterapeutútbúgving kann eisini n´tast sum leiðaraútbúgving á høgum støði.

Luttakarar í útbúgvingini fer at styrkja og menna tínar fakligu og persónligu førleikar.

## Praktiskt:

Útbúgvingin byrjar í juni 2009 og er í fýra ella fimm árligum iternatskeiðum (tilsamans 20 skeiðssamdøgur) frá hósdegi kl 10 til sunnudag kl 14:30. Kostnaðurin er 27.000 krónur árliga.

Meira kann lesast á heimasíðuni www.difkp.dk

Eisini ber til at senda teldupost til info@difkp.dk ella við at ringja 00 45 43 62 28 79






Bárður Michelsen

### Hósdagur 13. nov.

15:00 Tíðindi
15:10 Rock-balladir
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
21:00 Orð á leiðini – Sending hjá EVR. Jógvan Zachariassen leggur til rættis
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 14. nov.

07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsending
10:05 Morgunsending (framhald)
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending (framhald)
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttur leggur til rættis. Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Vinstra víkiskylda – Barbara Holm og Tjóðhild Patursson eru vertir
16:00 Tíðindi
16:05 Vinstra víkiskylda
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini. Jens Suni Hansen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Leygardagur 15. nov.

07:00 Tónleikur
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Vit vitja m.a. á K.O.B.- P/F Wenzel og Ivan Johansen Bilum
14:00 Vinnurásin – Jan Müller er vertur
15:00 Vinstra víkiskylda 1 (e) – Barbara Holm og Tjóðhild Patursson eru vertir.
16:00 Vinstra víkiskylda 2 (e) – Barbara Holm og Tjóðhild Patursson eru vertir.
16:50 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen ella Andrew Djurhuus leggja til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

...títt radio

### Bilradio (e)

– Fríggjadagin kl. 08.00

Sendingin Bilradio verður endursend fríggjadagin kl. 8.00 og leygardagin kl. 13.

Í sendingini verður vitjað á Brennistøðini á Hjalla, har stjórin Bárður Michelsen, greiðir frá um mannagongdir í sambandi við innlating og burturbeining av bilum.

Vit vitja hjá Ivan Johansen Bilum og práta við Kaj Boetius um rustviðgerð av bilum og við Jógvan Højgaard hjá P/F Wenzel um Ford Flexifuel, sum kunnu koyra upp á eina blanding av bioethanol og bensin.

Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um at sølan av italiensku Ferrari sportbilunum í Danmark er tvífaldað seinastu fimm árini.